Í stuttum



## Leyp á X-Factor dómara

25 ára gamla songkvinnan Cheryl Cole úr bólkinum Girls Aloud er ein av dómarunum til ensku X-Factor kappingina ,og hon var úti fyri eini keðiligari hending nú um dagarnar. Ein maður leyp á hana, tá hon skrivaði autografar til fjepparar, og so mátti eitt hjálparfólk – sum um ein vissur var í hølunum á teimum – leggja uppí. Framleiðararnir av X-Factor sendingini hava skerpa trygdina eftir hendingina.

## Tveitti 3-ára gamlan úr brúðarvígslu

Tað gekk ikki heilt eftir vild, tá amerikansku Ashley og Vicky Thorpe skuldu giftast. 3 ára gamli sonurin hjá teimum hermdi eftir prestinum, tá hann segði navnið á pápa sínum, og presturin var so fortørnaður um hetta, at hann bæð onkran bera smádreingin út um, ella helt vígslan ikki fram. Langomma dreingir vildi ikki hoyra talan um, at drongurin skuldi út, og vildi presturin hava hana út eisini. Nú hevur brúðarparið klagað til kirkjuráðið um atburðin hjá presti.





## Vinir nærkast aftur

Fjepparar um allan heimin hava, síðani røðin Vinir endaði í 2004, vónað, at teir seks vinirnir verða sameindir aftur. Og sambært Daily Mail er nú orsøk til at halda, at eitt Friends-comeback er á veg. Jennifer, Courtney og restin av bólkinum eru klár at fáa leiklutirnar til lívs aftur undir røttum umstøðum, sigur ein kelda við blaðið. Tað er góða móttøkan, ið 'Sex and the City'-filmurin fekk, ið ger hetta møguligt. Ein Friends-filmur hevði kunnað blivið líka væl umtikin, um hann verður gjørdur rætt. Higartil hevur Jennifer Aniston verið størsti trupulleikin, tí hon ikki hevur viljað farið aftur í leiklutin sum Rachel aftur. Men sambært keldunum, er hetta ongin trupulleiki longur.



## Kylie fekk konga-ligt heiðurstekin

**39 ára gamla avstalski sangfuglurin Kylie Minogue var sera rørd, tá hon í farnu viku fekk handað sítt OBE (Order of the British Empire). Tá Kylie fekk boðini, segði hon, at hon var djúpt rørd av at verða heiðrað av landinum, hon altíð hevur sæð sum sítt 'ættleiðingar-land'. Samstundis nýtti hon eisini høvið at takka bretsku fjepparunum fyri stuðulin, meðan hon hevði bróstkrabba – ið hon til alla lukku er grødd frá nú. Í dag eru skjótt 20 ár síðani, at Kylie fekk sína fyrstu stakfløgu á eitt fyrstapláss á bretska hitlistanum.**



## Lindsay fingið unnustu

**Tað hevur mangan verið róð fram undir, at sjónleikarin Lindsay Lohan skuldi verða meira enn væl við plátuvendaran Samantha Ronson. Higartil hevur Lohan ikki vilja sagt nakað um sambandið við Samanthu, men tað skal hon sambært The Mirror nú hava viðgingið. Hon hevur viðurkent, at hon brúkar tíð saman við einum, sum hon elskar, og hon skal hava lagt eina mynd av teimum báðum á sín myspace-profil.**

Sosialurin